# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



Mánadagin 3. apríl fekk Jákup ein lítlabeiggja. Hann var 54 cm langur og vigaði 4260 gr. Foreldrini eita Maria og Viggo Johannesen.



19. apríl fekk Lis ein lítlan beiggja! Hann var 56 cm. langur og vigaði 4210 gr. Foreldur teirra eru Berlina og Tummas Martin Sólsker.



Tann 27. apríl fingu Kristjan 11 ár, Anna Sofía 10 ár og Katarina 5 ár, ein beiggja. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3600 gr. Foreldrini eru Elsebeth Andreassen og Heri Joensen, Tórshavn.

28. apríl fingu Sólvá og Klæmint Eliasen, Fuglafjørður, ein son, ið eitur Dánjal Klæmintsson. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4000 gr.

28. apríl fingu Anni og Jógvan Thomsen, Hvalba, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4800 gr.

28. apríl fingu Marjun Wilhelm og Ólavur Brimnes, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4750 gr.

28. apríl fingu Signe Skaaning og Hans Jóhann Sørensen, Leynar, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4420 gr.

29. apríl fingu Guðrun Joensen og Finnur Hansson ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4200 gr.

30. apríl fingu Eygló Bjørg Jóhannsdóttir og Dánjal Salberg Adlersson, Streymnes, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4200 gr.

30. apríl fingu Beinta Henriksen, Sørvágur og Hendrik Qvist, Uummannaq, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3800 gr.

1. mai fingu Nancy og Karl Oddmar Rasmussen, Hvítanes, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3050 gr.

1. mai fingu Ann og Peter Ritter, Argir, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4400 gr.

3. mai fingu Sólrun Hammer, Hósvík og Mortan Poulsen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3285 gr.

## Heri Guttesen 50 ár

Sunnudagin 7. mai fyllir Heri Guttesen í Havn 50 ár.

Heri er føddur og uppvaksin í Havn. Hann hevur altíð havt sera stóran áhuga fyri bilum, og har var einki ivamál um, hvat hann skuldi læra til. Hann byrjaði at arbeiða hjá Reyni Service í Rættará í 1974, sum 17 ára gamal. Hann byrjaði á eykalutagoymsluni, og níggju mánaðir seinni fór hann í læru sum bilmekanikari á verkstaðnum.

Eivind av Reyni hevði tá yvirtikið bilasøluna eftir pápan, Sigird av Reyni, sum stovnaði fyritøkuna í 1947 og framvegis var virkin og arbeiddi har.

Heri hevur arbeitt hjá Reyni Service øll árini síðan, har hann hevur kunnað hildið bæði 25 og 30 ára starvsdagar. Hann hevur stóran áhuga fyri sínum starvi og er dugnaligur og nærlagdur. Hann hevur eisini fylgt væl við í mekanisku og tøkniligu menningini av bilunum hesi seinastu 30 árini.

Heri hevur serlig evnir at leggja til merkist og at minnast. Hann minnist næstan hvønn einstakan bil langt aftur í tíðina. Hann kennir eisini nógv fólk. Hann hevur gott handalag og er sera hjálpsamur, tá ið ræður um biltrupulleikar, bæði hjá næstringum og hjá fólki, sum kenna hann frá verkstaðnum.



Heri er sonur Herborg, f. Andreassen, og Petur Guttesen, bæði úr Havn. Mamman doyði í 1965, tá Heri var 8 ára gamal, og hann kom at vaksa upp hjá ommu síni við Hoydalsvegin. Hann var eisini nógv í Ullvøruhúsinum og fylgdi væl við í tí sum mammubeiggin, Leivur Andreassen, fekst við. Leivur hevði smiðju og var tiltikin góður handverkari.

Pápi Hera, Petur, giftist upp aftur við Elin Carlsson, f. Christiansen, í Havn. Tey fingu børnini Jan og Fíu, ið sostatt eru hálvsystkin hjá Hera. Jan er giftur við Báru úr Fuglafirði, tey eiga tvey børn og búgva í Keypmannahavn, og Fía býr í Havn.

Sum tey flestu á Tinghúsvegnum, har pápi Hera vaks upp, eru tey í Guttesen familjuni kend sum íðin 36-viðhaldsfólk, og Heri er einki undantak í so máta. Feðgarnir eru mest sum altíð at síggja til dystir hjá árstalsfelagnum.

Hóast Hera dámar væl bilar, dámar honum eisini væl at ganga, og sæst hann ofta ganga langar gongutúrar í býnum.

Heri er giftur við Elisabeth, f. Øregaard úr Fuglafirði. Tey eiga tríggjar døtur: Herborg, Karolina og Hanna, sum allar búgva í høvuðsstaðnum. Herborg er gift við Súna Haraldsen í Hoyvík.

Heri verður burturstaddur føðingardagin.

# Kórstevnan 2006



*Kórstevnan 2006 endar við konsert í Gøtu kirkju við stóra felagskórinum*

**Hóskvøldið 11. mei kl. 19.30 verður kórstevnan 2006 sett í Bygdarhúsinum í Leirvík. Kórstevnan er skipað yvir fleiri dagar, og endar leygardagin 13. mei við konsert við stóra felagskórinum í Gøtu Kirkju**

KÓRSTEVNA

Luttakarar á kórstevnuni eru øll sangáhugað. Neyðugt er ikki at melda til saman við nøkrum kóri, tá høvuðsendamálið við kórstevnuni er sangurin í stóra felagkórinum.

### Svenskur kórleiðari

Kórleiðari verður kendi svenskarin Robert Sund. Tey, sum plagdu at vera við á kórstevnum seinast í fýrsunum, minnast Robert Sund og hansara vøkru svensku satsir og góðu rútmisku útsetingar. Robert Sund kemur í ár arbeiða við svenskum kórtónleiki, men harumframt fer hann eisini at arbeiða við tveimum kórsatsum hjá Eivør, ið John Høyby hevur útsett til kór. Eivør syngur sjálv solo. Robert Sund er við sínum serligu gávum uttan iva ein av teimum størstu, tá tosað verður um Norðurlendskan kórtónleik.

Høvuðsinnihaldið í kórstevnuni er venjingin í stóra felagskórinum, men fríggjakvøldið kl 19.30 verður eisini konsert í bygdarhúsinum í Leirvík við teimum einstøku kórunum, og leygardagin kl. 17 fer stóra felagskórið á pall í Gøtu kirkju at vísa, hvat tey hava lært kórstevnudagarnar.

Felagskórið Gøta/Leirvík gleðir seg til at taka ímóti fólki úr bygd og bý. Er tað onkur, ið enn ikki hevur teknað seg, ber til at ringja til ein av fyrireikarunum – Josefina 256913, Maria 441614 ella Sigvør 219570. Praktiskar upplýsingar um kórstevnuna síggjast á www.gota.fo

**ave**